tøkni

enn betri atgongd til altjóða tíðarit og avísir. Vit kunnu í dag, og í enn størri mun tá e-bøkur gerast meira vanligar, hava eins góða atgongd til vitan, sum stórbýarbúgvar í fyrstaheimslondum hava.

Leggja vit okkum eftir at verða eitt talgild samfelag, skulu vit eisini ansa eftir at hava fólk at menna og tillaga skipanir til okkara tørv, eins og vit mugu ansa eftir at hava fólk at tryggja og viðlíkahalda skipanir. Tí eins smart kunningar- og samskiftistøkni er, eins viðbrekin er hon.

Visjónir

Ein visjón er at fáa meira visjónir frá fakfólki á økinum, eins og eina útmelding frá politisku flokkunum, um hvussu økið skal raðfestast. Kunningar- og samskiftistøkni fyllir alt meira í gerandisdegnum og letur upp vinnuligar møguleikar. Men tað er ikki nøktandi at vit bert velja at nevna kunningar- og samskiftistøkni, tí vit síggja at grannalond okkara menna seg á hesum økjum. KT-felagið er á beinari kós við fyriskipan av KT-messum. Men greið mál fyri hvar vit skulu, bæði politisk og vinnuligt, og í samstarvi, hevði styrkt okkum

Skúlin

Skulu vit skipa fólkaskúlan soleiðis, at teldan er ein meira náttúrligur partur í frálæruni, so øll børn venja seg við talgildan gerandisdag? Skal útbúgving og gransking á hesum øki verða partur av føroysku skipanini, ella skulu vit brúka orkuna at senda fólk aðrastaðir at vinna sær hesar kunnleikar? Ella kostar tað ov nógv í lestrarstuðli? Tað er m.a. ein raðfesting sum politiska skipanin skal taka støðu til nú. Eisini møguleikarnir fyri lestrar- og granskingarsamstarvi við ES er ein postur sum skal gjaldast, men sum uttan iva lønar seg fleirfaldt.

Skype heimurin

Enn einaferð skulu vit hugsa um hvat er mál og hvat er miðil. Kunningar-og samskiftistøknin er eitt amboð. Málið kann sjálvsagt verða at styrkja seg á hesum øki, tí tað kann skapa gevandi vinnu, eins og vit ikki skulu gloyma hentleikarnar. Í einum samfelagi sum í Føroyum er t.d. Skype ein gáva, samskifti við allan heimin fyri lítlan ella ongan kostnað. Og júst Skype er dømi um markloysið. Skapt og uppbygd eftir fáum árum av tveimum ungum monnum við einari visjón. Ein svii og ein dani, sum møguliga kundu skapa hetta, tí teirra lond hava íverksetanarmentannir og skipanir, men einamest tí teir høvdu eina visjón, sum teir gjørdu til veruleika.

Hvar er vinnan og hvar er politiska skipanin? Skulu vit verða fremstir, krevur tað samstarv og at kunningar- og samskiftistøknin bert er ein partur í eini størri heild.

TING-HELLAN

Samstarv krevst

Vinnan, útbúgvingarstovnar og politikararnir mugu samstarva, um Føroyar skulu menna seg innan KT økið. Tað heldur formaðurin í KT-felagnum. Hann metur, at Føroyar hava møguleika at klára seg í kappingini við onnur á økinum, tað ræður bara um at bjóða seg fram á røttu støðunum heldur Ísak N. Jacobsen



Ísak N. Jacobsen



Beinta Løwe Jacobsen

KT felagið fegnast um, at tad tykist sum um politikararnir eru til reiðar at menna KT økið, men formaðurin í felagnum Ísak N. Jacobsen spyr eisini hvat ítøkiligt verður gjørt fyri at menna økið. "Tad er ikki nógvur peningur settur av á fíggjarlógini til hatta økið, og hyggja vit at Fróðskaparsetrinum, so eru relevantar útbúgvingar har niðurlagdar, og tað harmar okkum, tí tað er útbúgvingarvegin vit skulu ganga. Vit skuldu allarhelst havt master og Ph.d. útbúvingar á KT økinum " vísur Ísak N. Jacobsen á.

Neyðugt við samstarvi

Fyrsta fyritreyt fyri at Føroyar kunnu menna seg á økinum eru útbúgvingar- og granskingarumhvørvi, sigur Ísak N. Jacobsen. Formaðurin leggur tó ikki alla ábyrgdina á politikararnar, tí sambært Ísaki N. Jacobsen, so er tað neyðugt við samstarvi.

"Hyggja vit aðra staðni, so síggjva vit at har sum tað hevur eyðnast væl, er har sum vinnan, granskingin og tað almenna samstarvar. Hetta gevur eina synergieffekt," sigur formaðurin í KT felagnum, og vísur á, at júst hesin frymilin hevur givið góð úrslit í m.a. Danmark og Svøríki.

Klára kappingina

Formaðurin er eisini sannførdur um at Føroyar kunnu gerast eitt undangonguland innan KT øki, og at vit hava eina framtíð innan vinnuna. Men tað kemur ikki av sær sjálvum, ger Íska N. Jacobsen vart við, og leggur dent á, at tað krevur, at vit bjóða okkum fram á teimun røttu støðunum við teim røttu tingunum. Hann er eisini vísur í at Føroyar kunnu standa seg í kappingini innan økið. "Tí ivist eg onga løtu í. Vit eiga nógvar góðar kreftir í dag. Spurningurin er bara um at fáa mobilisera tær, so tær samstarva og hála sama veg," heldur formaðurin.